

*Sugababes spældu fyri eini 40.000 fólkum í Tivoli í Keypmannahavn fríggjakvøldið. Sjálvandi var megahittið Push The Button millum sangirnar, sum bólkurin spældi*

# SØTT FRÁ SUGABABES

Óvanliga stór mannfjøld var møtt upp í Tivoli í Keypmannahavn fríggjakvøldið, tá ið enski gentubólkurin Sugababes fór á pallin. Tær bjóðaðu soul, popp og eitt risahitt, men í løtum var konsertin smákeðilig

**Konsert**
**Eyðun Klakstein**
**eydun@sosialurin.fo**

Sugababes er fremsti enski gentubólkurin í løtuni. Tríggjar kvinnur, sum hava selt fimm milliónir fløgur, hava havt fyrstapláss á enska hitlistanum, og sum spæla kring alt Europa. Fríggjakvøldið í síðstu viku vóru tær komnar til Keypmannahavnar, har Tivoli hvørt fríggjakvøld hevur konsert við donskum ella útlendskum bólki.

Áhugin fyri Sugababes var sera stórur, tí eini 40.000 fólk høvdu leitað sær í Tivoli at síggja og hoyra ensku kvinnurnar. Onkuntíð hava verið fleiri fólk til konsert í Tivoli, men hetta var eitt av teimum heilt stóru tiltøkunum.

Konsertirnar í Tivoli eru eitt sindur serligar. Samstundis sum tónleikurin ljómar av pallinum, hugna fólk sær í tornum, í rutsjubanum og aðrastaðni., men onkursvegna ber tað væl til at hava góðar konsertir har.

## Soul og poppur

Tónleikurin hjá Sugababes er eitt bland av soul og poppi. Nógva av tónleikinum er rímiliga friðarligt, og tað hoyrdist aftur í Tivoli hetta kvøldið. Onkrar løtu vóru smákeðiligar, meðan tær tríggjar kvinnurnar dansaðu við røddunum omaná róligum og tungum rútmum. Søtur soultónleikur, sum kanska riggar betur á eini fløgu enn á palli til júst hesa konsertina. Men so vóru eisini glottar, tá ið tær sungu sínar meira lívligu poppsangir, sum fólk kenna aftur. Ikki minst er sangurin Push The Button eitt ordans hitt, og sangurin var eisini tað, sum fólk helst vildu hoyra.

Pallurin í Tivoli er sera stórur, og tað er líka við, at tónleikararnir á pallinum hvørva eitt sindur. Stórskíggi er við síðuna av pallinum, og til eina konsert við Sugababes er ein slíkur skíggi eitt must. Tað røkkur ikki heilt, at fólk bara hoyra tónleikin og so síggja nakrar kvinnur langt burturi á einum stórum palli. Sugababes skulu ikki bara hoyrast, tær skulu eisini síggjast, og tí tænti stórskíggin sínum endamáli.

## Einki show

Tær tríggjar kvinnurnar í Sugababes syngja sera væl. Tónleikurin er væl samansettur, og tey bestu poppløgini hjá teimum fanga veruliga fólk.

Hinvegin plaga gentubólkar av hesum slagi at hava eitt stórt show, sum skal fylgja saman við rútmum og røddum, men Sugababes gjørdi ikki ov nógv av við showinum. Tær dansaðu og fluttu seg runt á pallinum, høvdu hampuliga gott samband við áhoyrararnar frammi við pallin, men annars var ikki nógv annað, sum kundi imponera av pallinum.

Til onkrar sangir stóðu tær tríggjar lið um lið og sungu, og tá tóktist pallurin verða ov stórur til bólkin.

Sugababes eru eitt heitt navn á europeiskum hitlistum, og tær hava veruliga nakrar framúr góðar poppsangir. Sjónbandaløgini hjá teimum eru eisini hugtakandi og fangandi, men kanska er tað har, at tær fyrst og fremst kunnu hugtaka.

Á eini konsert er bólkurin góður, men ikki framúr góður.